

*Jan Müller, forstjóri í Miðlahúsinum handar teimum trimum, Riu, Súsonnu og Hans Tórgarð hvør sín kekk uppá 25.000 kr.*

# Listavirðisløn Miðlahúsins 2009

**Systkini Súsanna, Ria og Hans Tórgarð fáa Listavirðisløn Miðlahúsins 2009 fyri teirra stóra og slóðbrótandi virksemi fyri føroyska leiklist. Tey hava í mong ár og mangan undir truplum umstøðum verið framúr virkin við sjónleiki, leikstjórn og leikriti, og listarliga arbeiði teirra hevur havt stóran týdning fyri føroyska leiklist og føroyskan samleika. Við stórum ídni, góðum sjónleikaragávum og málsligum hegni hava tey trý saman við mongum øðrum innan leiklistaøkið verið við til at flyta føroyska leiklist fram á altjóða støði. Súsanna, Ria og Hans Tórgarð hava við leiklistini givið føroysku áskoðarafjøldini ríkar og ógloymandi upplivingar, samstundis sum tey hava verið við til støðugt at menna føroyskan sjónleik sum listagrein í Føroyum.**

ár ríkað føroyska áskoðaran við góðari leiklist – til gaman og og til álvara. Tey hava sostatt leingi verið millum okkara, ídnastu og gávuríkastu sjónleikarar.

At velja sjónleik sum lívsstarv er ikki bara sum at siga tað í einum landi sum okkara. Játtanir til list røkka sum heild alt ov stutt. Føroyar eru enn eitt menningarland, tá vit hugsa um mentanarpolitikk og tá serstakliga um korini hjá teimum, sum hava valt sær útinnandi list, eitt nú sjónleik, sum lívstarv.

Vit hava nógv at takka hesum trimum fyri, eins og vit hava so nógv at takka øllum okkara yrkislistafólkum fyri. Tey standa mangan á samfelagsins síðulinju, sum ein av hesum trimum systkinum tók til í blaðsamrøðu herfyri. Fra hesi síðulinju síggja tey mangt, sum vit onnur ikki duga at síggja ella ikki vilja síggja, og hetta kemur okkum øllum til góðar so ella so.

At enda fari eg at takka tykkum trimum fyri alt tað, ið tit hava verið fyri føroyska leiklist og eg fari samstundis at ynskja tykkum alt tað besta og góða eydna á framtíðar starvsleið tykkara.

Eftir røðuna fingu tey trý hvør sín kekk uppá 25.000 kr. Og blómutyssi.



*Ria, Súsanna og Hans saman við mammuni*